Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í vinnumálum

Evni: Útvarp í Viðareiðistunlinum

Spurningar:

1. Hvussu langt er arbeiðið við at gera útvarpssamband í Viðareiðistunlinum komið?
2. Nær verður hetta arbeiðið liðugt?

Viðmerkingar:
Í síðstu fíggjarlógini hjá undanfarnu samgongu, sum er galdandi fyri í ár, varð peningur settur av til at tryggja, at útvarp skuldi kunna hoyrast í Viðareiðistunlinum.

Nú árið er væl meira enn hálvliðið er arbeiðið enn ikki framt. Tí hesin spurningur.

Á Løgtingi, 13.08.2026

Eirikur í Jákupsstovu